**Føroya Arbeiðsgevarafelag**

# FØROYSKI BÚSKAPURIN

Korona og óvissa merkja føroyska samfelagsbúskapin

September 2020

# INNIHALDSYVIRLIT

**SAMANDRÁTTUR** ..... 3

**SØGULIGT HÓTTAFALL Í ALTJÓÐA BÚSKAPINUM** ..... 5

**FØROYSKI ÚTFLUTNINGURIN MERKTUR AV KORONA** ..... 7

**FERÐ ER FRAMVEGIS Á HEIMLIGA VIRKSEMINUM** ..... 10

**FØROYSKI ARBEIÐSMARKNAÐURIN MERKT LÍTIÐ TIL KORONA** ..... 16

**STÓR ÓVISSA MYNDAR FRAMTÍÐARÚTLITINI** ..... 19

# SAMANDRÁTTUR

Altjóða búskapurin var spakuliga við at koma fyri seg aftur, áðrenn koronafarsóttin brádliga breyt út og vendi øllum á høvdið tíðliga í hesum árinum.

Koronafarsóttin hevur skapt størsta hóttafallið, ið er skrásett í altjóða búskapinum í nýggjari tíð, og í løtuni eru framtíðarútlitini sera óviss.

Í Føroyum er koronahóttanin vorðin partur av gerandisdegnum, men støðan í føroyska samfelagsbúskapinum er framvegis óvanlig, og hevur ikki rættiliga tillagað seg gongdina og hóttanina frá koronafarsóttini.

Tað ber tí illa til at gera metingar um støðuna og útlitini fyri føroysku bruttotjóðarúrtøkuna, BTÚ, nú og frameftir, uttan at hetta verður til ymsar gitingar við stórari óvissu. Tað ber tó til at gera ymsar staðfestingar og metingar um útlitini við tí vitan og tølum, sum liggja á borðinum í løtuni.

Tað kann staðfestast, at koronafarsóttin longu hevur sett síni spor hjá føroysku útflutings-fyritøkunum og á føroyska heimamarknaðinum, serliga í ferðavinnuni og ymsum vinnum, ið eru knýttar at ferðavinnuni, har koronatiltøkini læstu stóran part av virkseminum niður.

Føroyski arbeiðsmarknaðurin hevur tó ikki verið so nógv ávirkaður av koronakrepppuni higartil við vaksandi arbeiðsloysi. Hetta kemst helst av, at føroyski búskapurin var yvirupp-hitaður, tá ið koronafarsóttin breyt út.

Tá ið tað kemur til framtíðarútlitini fyri føroyska samfelagsbúskapin og føroysku vinnuna, so eru tey merkt av stórari óvissu í løtuni.

Tað er ikki bert koronaóvissan, sum ger seg galdandi.

Fiskivinnuavtalan millum Føroyar og strandalondini gongur út um ársskiftið, og Føroyar hava onga nýggja avtalu gjørt. Føroyar hava heldur onga fiskivinnuavtalu gjørt við Stórabretland, nú Stórabretland fer úr ES á nýggjárinum.

Langtíðaríløguætlanirnar hjá landinum vórðu tiknar av skránni í vár, og tær eru ikki komnar á skránna aftur. Hetta er fyrstu ferð, at Løgtingið hevur tikið langtíðarætlanirnar av skránni, og hetta leggur stein oman á byrðu í óvissu framtíðarútlitunum.

Fíggjarpolitikkurin hjá landi og kommunum hevur annars verið serstakliga stimbrandi hesi seinastu árini, og tað fer tí at krevja gott politiskt handalag og dugnasemi at stýra føroyska samfelagsbúskapin frameftir, soleiðis at land og kommunur ikki høgga bremsurnar í, nú niðurgongd og færri skatta- og avgjaldsinntøkur hómast fyri framman.

# SØGULIGT HÓTTAFALL Í ALTJÓÐA BÚSKAPINUM

**Vøksturin í altjóða búskapinum varð brádliga vendur á høvdið av koronafarstóttini, sum spjaddi seg um allan heimin tíðliga í hesum árinum. Koronafarsóttin hevur skapt størsta hóttafallið, ið er skrásett í altjóða búskapinum í nýggjari tíð, og í løtuni eru framtíðarútlitini sera óviss**

Framgongd var í altjóða búskapinum, áðrenn koronafarsóttin brádliga spjaddi seg um allan heimin, tíðliga í hesum árinum, og vendi framgongdina á høvdið eftir met stuttari tíð, tá ið umfatandi tiltøk vórðu sett í verk, fyri at forða smittuni at spjaða seg enn meira.

Avleiðingarnar av koronafarsóttini og tiltøkunum at forða smittuni at spjaða seg hava rakt heimsbúskapin sera meint og eru nógv ógvusligari enn nakar annar skelkur, sum er skrásettur í heimsbúskapinum í nýggjari tíð ella í friðar tíð yvirhøvur.

Mett verður, at samlaða bruttotjóðarúrtøkan, fyri øll lond í heiminum, fer at minka 4,9% í ár. Til samanberingar minkaði samlaða bruttotjóðarúrtøkan 0,1% undir fíggjarkreppuni í 2009[1].

Koronakreppan er eisini meira umfatandi enn aðrar kreppur, ið hava rakt heimsbúskapin í nýggjari tíð. Undir fíggjarkreppuni minkaði búskaparliga virksemið í 60% av heimsins londum, men í ár verður mett, at 90% av heimsins londum fara at merkja sviðan av koronakreppuni við fallandi búskaparligum virksemi[2].

Tað er tó ymiskt, hvussu búskaparligu avleiðingarnar av koronakreppuni merkjast ymsa staðni í heiminum. Bruttotjóðarúrtøkan í ES minkaði 11,9% í øðrum ársfjórðingi í ár[3]. Í ringast raktu ES-londunum í Suður Evropa, har búskaparliga virksemið er nær tengt at ferða-, hotell- og matstovuvinnunum, tódnaði bruttotjóðarúrtøkan umleið 20%, meðan fallið donsku bruttotjóðarúrtøkuni var 7,4%.

Búskaparliga hóttafallið sæst aftur í arbeiðsloysistølunum kring allan heimin. Í USA hevur arbeiðsloysið sett met undir koronakreppuni. Har hækkaði arbeiðsloysið úr 3,5% í februar upp í umleið 15% eftir eftir bert trimum mánaðum, men er síðani minkað nakað aftur. Týski arbeiðsmarknaðurin hevur eisini verið nógv ávirkaður av koronakreppuni. Í Týsklandi arbeiddu meira enn 20% av arbeiðsstyrkini niðursetta tíð í apríl í ár, og hetta talið er væl hægri enn tað var undir fíggjarkreppuni í 2009.

Í kjalarvørrinum av koronakreppuni hava fleiri lond sett í verk ymsar stuðulsskipanir at stimbra búskaparliga virksemið. Talan hevur serliga verið um gjaldførisstuðul av ymsum slag,

---

[1] IMF, World Economic Outlook, juni 2020.
[2] IMF, World Economic Outlook, juni 2020.
[3] Danmarks Statistik, BNP-indikator 2. kvt. 2020.

t.d. at útseta skatt, avgjøld umframt almenn veðhald fyri bankalán. Stuðulsskipanirnar hava verið ymiskar í teimum ymsu londunum, alt eftir avbjóðingunum í viðkomandi landi, men IMF metir, at tiltøkini hesaferð hava verið meiri stimbrandi enn tey vóru undir fíggjarkreppuni, árini frá 2008 til 2010.

Munandi partur av búskaparliga virkseminum kring heimin hevur sostatt koyrt við stimbrandi fíggjarpolitikki av ymsum slag undir koronakreppuni, men stimbrandi fíggjarpolitikkur er ikki nøkur varandi loysn, serliga tí at fleiri lond hava lítið rásarúm til virksemisskapandi fíggjarpolitikk. Fleiri lond stríðast framvegis við avleiðingarnar av fíggjarkreppuni fyri góðum tíggju árum síðan. Almennu kassarnir í hesum londum vóru tí longu hart sperdir, áðrenn koronafarsóttin breyt út. Her er tí lítið rúm fyri at økja almennu skuldina enn meira.

Framtíðarútlitini fyri heimsbúskapin eru tí sera óviss í løtuni, og útlitini eru beinleiðis tengd at, hvussu koronafarsóttin fer at hátta sær í nærmastu framtíð. Fara tað at koma fleiri smittubylgjur, áðrenn tað eydnast at finna eitt koppingarevni ella heilivág ímóti sjúkuni? Hvussu fer tað at eydnast at tillaga samfelags- og vinnubygnaðin í ymsu londunum til fleiri smittubylgjur? Og hvat fer hetta at merkja fyri atferðina hjá brúkarunum og eftirspurningin í heimsbúskapinum?

# FØROYSKI ÚTFLUTNINGURIN MERKTUR AV KORONA

**Stór framgongd hevur verið í føroyska handilssamskiftinum úteftir seinastu árini, men gongdin vendi fyrra hálvár í ár, tá koronafarsóttin spjaddi seg um allan heimin. Stóru avbjóðingarnar fyri føroyskan uttanlandshandil í nærmastu framtíð er at fáa nýggja fiskivinnuavtalu í lag við Stórabretland og at betra um marknaðaratgongdina fyri føroyskar fiskavørur**

**Talva 1: Føroyski handilsjavnin við vørum, 2012-2019**

| Mió. kr. | **2012** | **2013** | **2014** | **2015** | **2016** | **2017** | **2018** | **2019** |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Útflutningur tilsamans** | **5.553** | **6.181** | **6.461** | **6.942** | **8.090** | **8.777** | **8.023** | **9.539** |
| Laksur | 1.823 | 2.456 | 2.951 | 2.805 | 3.662 | 3.868 | 3.342 | 4.042 |
| Uppsjóvarfiskur | 1.408 | 1.571 | 1.522 | 1.754 | 1.878 | 2.388 | 1.848 | 2.391 |
| -Svartkjaftur | 173 | 152 | 123 | 161 | 176 | 145 | 156 | 161 |
| -Sild | 329 | 410 | 291 | 484 | 402 | 622 | 486 | 739 |
| -Makrelur | 827 | 814 | 884 | 854 | 990 | 1.039 | 682 | 964 |
| -Fiskamjøl og fóður | 79 | 195 | 224 | 255 | 310 | 582 | 524 | 527 |
| Toskur hýsa og upsi | 935 | 916 | 956 | 1.178 | 1.110 | 1.152 | 1.308 | 1.621 |
| Síl rækjur o.a. | 870 | 857 | 751 | 974 | 1.024 | 967 | 988 | 882 |
| Aðrar vørur | 211 | 277 | 269 | 180 | 194 | 312 | 447 | 509 |
| Skip og flogfør | 306 | 104 | 12 | 51 | 222 | 90 | 90 | 94 |
| **Innflutningur tilsamans** | **6.683** | **6.273** | **6.021** | **6.125** | **6.598** | **7.261** | **7.746** | **8.146** |
| Til hav- og landbúnað | 366 | 381 | 346 | 410 | 428 | 446 | 485 | 550 |
| Rávøra til fiskavirking | 156 | 168 | 123 | 183 | 217 | 310 | 244 | 263 |
| Tilfar til byggivinnuni | 357 | 427 | 502 | 523 | 617 | 691 | 817 | 834 |
| Tilfar til aðra framleiðslu | 1.349 | 1.319 | 1.398 | 1.406 | 1.460 | 1.580 | 1.616 | 1.917 |
| Maskinur og amboð | 447 | 410 | 651 | 603 | 861 | 832 | 1.014 | 800 |
| Brennievni | 1.303 | 1.249 | 1.159 | 803 | 647 | 950 | 1.283 | 1.134 |
| Akfør | 213 | 279 | 307 | 382 | 412 | 498 | 494 | 567 |
| Til beinleiðis nýtslu | 1.164 | 1.215 | 1.287 | 1.339 | 1.437 | 1.555 | 1.580 | 1.657 |
| Skip og flogfør | 1.328 | 825 | 248 | 476 | 519 | 399 | 213 | 424 |
| **Handilsjavni** | **-1.130** | **-92** | **440** | **817** | **1.492** | **1.516** | **277** | **1.393** |

Kelda: Hagstova Føroya.

Føroyar eru eitt sera lítið og opið samfelag, og grundarlagið undir føroyska samfelagsbúskapinum eru tí tær inntøkur, sum handilssamskiftið við útheimin skapa. Inntøkurnar og útlitini fyri

føroyska samfelagsbúskapin hanga tí beinleiðis saman við eftirspurningin eftir føroyskum vørum og framleiðslu uttanífrá.

Útflutningurin av vørum er nærum tvífaldaðist frá 2012 til 2019, sí talvu 1. Útflutningurin var góðar 4 mia. kr. hægri í 2019 enn í 2012. Sama tíðarskeið vaks innflutningurin góðar 1,4 mia. kr. Útflutningsvirðið hevur tí verið væl hægri enn innflutningsvirðið, og hetta hevur skapt stórur inntøkur uttanífrá til føroyska samfelagsbúskapin seinastu árini.

Henda gongdin vendi fyrra hálvár í ár.

Sambært nýggjastu uppgerðini hjá Hagstovu Føroya yvir føroyska uttanlandshandilin var stórt fall í føroyska vøruútflutninginum fyrra hálvár í ár, sí talvu 2.

**Talva 2: Føroyski vøruútflutningurin fyrra hálvár 2019 og 2020**

| Mió. kr. | 2019 | 2020 | Munur | í % |
|---|---|---|---|---|
| **Útflutningur tilsamans** | **4.468** | **4.018** | **-450** | **-10** |
| Fiskavøruútflutningur tilsamans | 4.211 | 3.795 | -416 | -10 |
| -Toskur | 631 | 485 | -146 | -23 |
| -Upsi | 137 | 128 | -9 | -7 |
| -Hýsa | 100 | 86 | -14 | -14 |
| -Makrelur | 484 | 422 | -62 | -13 |
| -Sild | 192 | 188 | -4 | -2 |
| -Svartkjaftur | 84 | 84 | 0 | 0 |
| -Svartkalvi | 50 | 42 | -8 | -16 |
| -Laksur | 1.891 | 1.786 | -105 | -6 |
| -Slógv og fiskaúrdráttir | 110 | 27 | -84 | -76 |
| -Annar fiskur | 531 | 547 | 15 | 3 |
| Aðrar vørur | 232 | 223 | -8 | -4 |
| Skip og flogfør | 25 | 0 | -25 | -100 |

Kelda: Hagstova Føroya.

Hóast tað ikki hevur verið óvanligt við stórum sveiggjum í føroyska vøruútflutninginum í fyrra hálvári, so er lítið at ivast í, at koronafarsóttin hevur havt týðandi ávirkan á útflutningin fyrra hálvár í ár.

Fiskur og fiskavørur liggja um 94% av føroyska vøruútflutninginum, og tá koronatiltøkini brádliga læsti nærum alt matstovuvirksemi niður yvir allan heimin, so merktu føroyskir útflytarar hetta alt fyri eitt á eftirspurninginum eftir fiski og fiskavørum, sum minkaði nógv yvir heilt stutta tíð. Fiskamarknaðirnir gjørdust sera trekir, og goymslurnar hjá fiskaframleiðarunum vuksu skjótt og gjørdust ov stórar.

Hóast marknaðirnir spakuliga eru latnir upp aftur, so skapar koronafarsóttin framvegis stóra óvissu um eftirspurningin eftir føroyska vøruútflutninginum. Óvissan snýr seg ikki bert um nøgdir, men eisini um, hvussu prísirnir fara at hótta sær í nærmastu framtíð[4].

Flestu føroysku útflutningsfyritøkurnar hava longu merkt koronafarsóttina á prísunum. Prísirnir á laksi eru lægri enn somu tíð í fjør, og prísirnir á hvítfiski hava verið upp til 20% lægri higartil í ár, samanbornir við somu tíð í fjør. Tað eru eisini onnur viðurskifti, sum ávirka fiskaprísirnar, men koronafarsóttin er heilt vist ein orsøk til prísfallið higartil.

Fleiri eygleiðarar meta tó, at ógvusliga fallið í eftirspurninginum í altjóða búskapinum ikki er varandi, men fer at rætta seg rímiliga skjótt aftur. Hesar metingar eru grundaðar á, at tað hevði í longri tíð verið ein støðug framgongd í altjóða búskapinum, tá ið koronafarsóttin rakti allan heimin sum snarljós frá klárum himni.

Grundarlagið undir hesi kreppuni er tí ikki ójavnar av ymsum slag, sum vanliga hava verið orsøkin til hóttafall í altjóða búskapinum, ikki minst í sambandi við altjóða fíggjarkreppuna fyri góðum 10 árum síðan.

Umframt korona, so er stóra avbjóðingin fyri føroyskan uttanlandshandil í nærmastu framtíð at fáa nýggja fiskivinnuavtalu í lag við Stórabretland og at betra um atgongdina fyri føroyskar fiskavørur. Fiskivinnuavtalan við strandalondini gongur út um ársskiftið, og Føroyar hava heldur onga nýggja fiskivinnuavtalu fingið við Stórabretland, nú Stórabretland fer úr ES á nýggjárinum.

Harumframt er marknaðaratgongdin fyri føroyskar fiskavørur, sum heild, verri enn hjá okkara kappingarneytum á fleiri áhugaverdum marknaðum.

[4] Seinastu metingarnar hjá IMF siga, at bruttotjóðarúrtøkan í øllum heiminum fer at minka 4,9% í ár, men heili 7,1% í teimum 15 londunum, sum Føroyar útflyta mest til. Ein av fortreytunum fyri hesi metingini var, at gongdin í smittuspjaðingini ikki versnar, so neyðugt verður at herða tiltøkini aftur. IMF væntar ein vøkstur í heimsbúskapinum á 5,4% í 2021, men henda metingin er rættiliga óviss og skal tí takast við stórum fyrivarni.

# FERÐ ER FRAMVEGIS Á HEIMLIGA VIRKSEMINUM

**Ferð er framvegis á heimliga eftirspurninginum, hóast avleiðingarnar av koronafarsóttini hava broytt fortreytirnar í føroysku ferðavinnuni og øðrum vinnum, ið eru knýttar at ferðavinnuni**

Stóru útflutningsinntøkurnar hava skapt stóra framgongd og vøkstur í heimliga búskapinum seinastu árini. Stórur vøkstur hevur verið í lønargjaldingunum, sí mynd 1. Fólkatalið, løntakaratalið og lága arbeiðsloysið settu øll met í 2019, sí talvu 3. Arbeiðsloysið var heilt niðri á 0,8% í seinnu helvt av 2019.

**Mynd 1: Lønargjaldingar, 2012-2019**




Kelda: Hagstova Føroya

**Talva 3: Fólkatal, løntakarar og arbeiðsloysi, 2012-2019**

| | 2012 | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 | 2018 | 2019 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Fólkatal (1.januar) | 48.204 | 48.062 | 48.153 | 48.617 | 49.121 | 49.810 | 51.475 | 51.300 |
| Løntakarar | 22.839 | 22.535 | 23.149 | 23.967 | 24.519 | 25.473 | 26.259 | 26.940 |
| Arbeiðsloysi í % | 5,6 | 4,5 | 3,8 | 2,9 | 2,9 | 2,4 | 1,8 | 1,1 |

Kelda: Hagstova Føroya

Soleiðis vóru fortreytirnar, tá ið Føroyar komu inn í 2020, stutt fyri at koronasmittan spjaddi seg um allan heimin. Búskaparliga støðan var munandi betri í Føroyum samanborin við fleiri onnur lond, sum spakuliga vóru við at koma fyri seg aftur eftir avleiðingarnar av fíggjarkreppuni fyri góðum 10 árum síðan.

Í nógvum londum var gongd við at koma á virksemið aftur, eftir avleiðingarnar av fíggjarkreppuni, men hetta hevði kostað almennu kassunum nógv, við áhaldandi at stimbra búskaparliga virksemið, fleiri ár eftir altjóða fíggjarkreppuna. Almenna skuldin var tí stór í nógvum londum, sum tí høvdu lítið rásarúm at stimbra búskaparliga virksemið við øktum almennum útreiðslum.

Í Føroyum var støðan annarleiðis. Føroyska samfelagið reið á aldukambinum í einum búskaparligum hákonjunkturi, eftir fleiri ár við stórari framgongd í búskaparliga virkseminum, har stóru avbjóðingarnar høvdu verið at útvega arbeiðsmegi til at nøkta nógva eftirspurningin.

Føroysk vinna var tí væl polstrað eftir fleiri ár við góðum úrslitum, men koronafarsóttin rakti kortini vinnuna meint. Vinnan hevði góðar vónir um framhaldandi vøkstur, tá koronasmittan púra óvæntað tók seg upp. Fleiri fyritøkur høvdu tí lagt nógv fyri og vóru í holt við stórar íløgur, tá ið koronafarstóttin brádliga broytti allar fortreytirnar hjá vinnuni.

Tað var serliga ferðavinnan, ið beinanvegin merkti sviðan av koronafarsóttini, tá ið føroyska samfelagið brádliga varð læst niður. Hóast føroyska ferðavinnan framvegis er ein lutfalsliga lítil partur av samlaða føroyska búskapinum, so hevur vøksturin í føroysku ferðavinnuni verið sannførandi hesi seinastu árini.

**Mynd 2: Bruttovirðisøking frá útlendskum ferðafólkum, 2011-2020**




Kelda: Hagstova Føroya

Bruttovirðisøkingin frá útlendskum ferðafólkum er farin úr 165 mió. kr. í 2011 upp í 421 mió. kr. í 2019[5], og nærkaðist nú einari hálvari milliard, áðrenn koronakreppan broytti allar fortreytirnar í ferðavinnuni, sí mynd 2.

Ferðavinnan hevur nógv avleitt virksemi við sær. Í 2019 rindaðu føroysku gistingarhúsini og matstovurnar næstan 166 mió. kr. í lønum, sí mynd 3.

**Mynd 3: Lønargjaldingar frá gistingarhúsum og matstovum**




Kelda: Hagstova Føroya

**Mynd 4: Løntakarar í gistingarhúsum og matstovum, 2011-2019**




Kelda: Hagstova Føroya

[5] Sambært árligum kanningum hjá Hagstovu Føroya.

Tað starvaðust næstan 900 løntakarar í føroysku gistingarhúsunum og matstovunum í 2019, sí mynd 4.

Stóri vøksturin seinastu árini og góðu útlitini fyri framhaldandi vøkstri, hevur tí skapt stórt bjartskygni í føroysku ferðavinnuni, og tí hevur ferða-, matstovu- og gistingarhúsvinnan gjørt stórar íløgur seinastu tíðina. Fleiri av hesum íløguverkætlanum vóru framvegis í gerð tá koronafarsóttin rakti og hava tí einki kastað av sær, nú koronakreppan hevur sent ferðavinnuna fleiri ár aftur í tíðina.

Føroyska ferðavinnan var tí ógvuliga viðbrekin og hevði lítið mótstøðuføri mótvegis óvanliga harða skelkinum, sum koronakreppan hevur givið ferðavinnuni. Nýggjastu tølini hjá Hagstovu Føroya[6] vísa, at tað vóru 54% færri gistingar á føroysku gistingarhúsunum fyrstu sjey mánaðirnar í ár samanborið við somu tíð í fjør.

Føroyski búskapurin fer tí helst at tódna omanfyri 300 mió. kr. í ár av afturgongdini í ferðavinnuni.

Tað er annars ymiskt, hvussu koronatiltøkini hava rakt heimligu handilsvinnuna. Handlar, ið selja byggi-, mat- og vanligar gerandisvørur hava í stóran mun koyrt sum vanligt og onkur hevur havt meira at gera. Harafturímóti minkaði sølan av klædnavørum, matveitingum, heilsølu til ferðavinnuna og bilum, sí mynd 5.

**Mynd 5: Skrásettir persónbilar, januar-august, 2010-2020**




Kelda: Akstovan

[6] Sambært heimasíðuni hjá Hagstovu Føroya 1. september 2020.

Eisini smærri føroyskar ídnaðarfyritøkur, ið eru í harðari kapping við innflutningin frá útlendskum fyritøkum á føroyska marknaðinum, hava merkt stóra afturgongd undir korona-kreppuni.

Avbjóðingin at útvega arbeiðsmegi hevur í longri tíð verið ein forðing fyri vøkstri í handilsvinnuni. Henda avbjóðingin er ikki horvin í kjalarvørrinum at koronakreppuni.

Stórur vøkstur hevur verið í føroysku byggivinnuni seinastu árini, og løngargjaldingarnar og talið av løntakarum vaksið skjótt yvir stutta tíð. Lønargjaldingarnar eru meira enn tvífaldaðar frá 2013 til 2019, sí mynd 6.

**Mynd 6: Lønargjaldingar í byggivinnuni, 2010-2019**




Kelda: Hagstova Føroya

Í 2019 vóru næstan 900 fleiri løntakarar í føroysku byggivinnuni enn í 2012, sí mynd 7, og tørvurin á arbeiðsmegi var framvegis metstórur, tá ið vit komu inn í hetta árið.

Byggivinnan væntaði longu tíðliga í hesum árinum, at tørvurin á arbeiðsmegi fór at minka í nærmastu framtíð, tí fleiri størri byggiverkætlanir fara at verða lidnar um somu tíð í hesum árinum. Føroyska byggivinnan væntaði tó, at tað framvegis fór at vera nógv virksemi í byggivinnuni komandi tíðina, tí nógvir ordrar stóðu á bíðilista.

**Mynd 7: Løntakarar í byggivinnuni, 2010-2019**




Kelda: Hagstova Føroya

Tað er framvegis fitt av virksemi í byggivinnuni, sí mynd 8, men koronatiltøkini hava skapt stóra óvissu um framtíðarútlitini. At tað almenna hevur lagt sínar langtíðarætlanir til síðis, samstundis sum fleiri privatar verkætlanir fyribils eru útsettar, tí støðan er so óviss í løtuni, skapar serliga stóra ørkymlan í byggivinnuni.

**Mynd 8: Løntakarar í byggivinnuni, januar-juli 2020**




Kelda: Hagstova Føroya

Fleiri fyritøkur í byggi- og handverkaravinnunum stúra tí fyri, at ordrabøkurnar verða tómar, tá ið vit koma longur út í árið.

# FØROYSKI ARBEIÐSMARKNAÐURIN MERKT LÍTIÐ TIL KORONA

**Samanumtikið hevur føroyski arbeiðsmarknaðurin higartil ikki verið serliga nógv merktur av avleiðingunum av koronatiltøkunum. Hetta kemst serliga av, at føroyski búskapurin sprutt kókaði, tá ið koronafarsóttin tók seg upp og spjaddi seg til okkara leiðir**

Hóast ávísar vinnugreinar hava verið hart raktar, so er føroyski arbeiðsmarknaðurin sum heild ikki serliga nógv merktur av avleiðingunum av koronakreppuni. Arbeiðsloysið er farið nakað upp í hesum árinum, sí mynd 9, men tað er framvegis sera lágt samanborið við aðrastaðni.

**Mynd 9: Føroyska arbeiðsloysisprosentið, januar 2019-mai 2020**




Kelda: Hagstova Føroya

Talið av fólki í serligu lønarískoytisskipanini hjá ALS, sum var eitt tað fyrsta almenna hjálpar-tiltakið, ið varð sett í verk, tá ið ið koronatiltøkini læstu partar av vinnuni niður, minkaði somuleiðis alla ta tíðina, skipanin var í gildi.

Tað vóru omanfyri 4.300 fólk í hesi skipanini fyrst í apríl, men hetta talið var minkað niður í góð 600 fólk, tá skipanin fór úr gildi tann 31. august, sí mynd 10. Mett verður, at ein partur fer yvir í vanligu arbeiðsloysisskipanina, møguliga ein lítil triðingur av teimum gott 600, ið vóru í skipanini, tá ið hon fór úr gildi.

**Mynd 10: Móttakarar av lønaríSkoyti, mars-august 2020**




Kelda: ALS

Samanlagt er goldið 5% meira umvegis A-skattaskipanina frá januar til juli í ár samanborið við somu tíð í fjør. Tá eru allar lønir og veitingar taldar við. Um allar veitingar, sum eru pensjónir, arbeiðsloysisstuðul og ymiskur annar stuðul, verða soldaðar frá, og bert lønirnar eru eftir, so varð goldið 2,6% meira í lønum frá januar til juli í ár samanborið við somu tíð í fjør. Tað var bert í mai mánað í ár, at samlaðu lønargjaldingarnar vóru lægri enn somu tíð í fjør, sí talvu 4.

**Talva 4: Lønargjaldingar, januar-juli 2019 og 2020**

| | A-skattaskipanin | | | Útgoldin løn | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | **2019** | **2020** | **Munur** | **2019** | **2020** | **Munur** |
| Januar | 923 | 952 | 3,1% | 768 | 782 | 1,8% |
| Februar | 1.010 | 1.068 | 5,7% | 837 | 892 | 6,6% |
| Mars | 971 | 1.049 | 8,0% | 812 | 876 | 7,9% |
| Apríl | 1.010 | 1.076 | 6,5% | 841 | 843 | 0,2% |
| Mai | 976 | 994 | 1,8% | 825 | 802 | -2,8% |
| Juni | 993 | 1.037 | 4,4% | 830 | 843 | 1,6% |
| Juli | 1.002 | 1.051 | 4,9% | 848 | 874 | 3,1% |
| **Tilsamans** | **6.885** | **7.227** | **5,0%** | **5.761** | **5.912** | **2,6%** |

Kelda: TAKS og Hagstova Føroya

At avleiðingarnar av koronatiltøkunum ikki síggjast so væl aftur í føroyska búskapinum, kemst serliga av búskaparligu støðuni í Føroyum, tá ið koronasmittan fór at gera um seg.

Føroyski búskapurin var yvirupphitaður og sprutt kókaði, tá ið vit komu inn í hetta árið. Ein tann størsta avbjóðingin hjá føroysku vinnuni, fyri framhaldandi vøkstri, var at útvega arbeiðsmegi, samstundis sum føroyska arbeiðsmegin var tann virknasta í Evropa[7].

Tað var sostatt arbeiði meira enn til allar hendur, tá ið koronasmittan rakti Føroyar, og tá búskapurin sprutt kókar, so kólnar hann ikki alt fyri eitt, um tað brádliga verður skrúva niður fyri hitanum.

Heimliga handilsvinnan hevði framvegis avbjóðingar við at útvega arbeiðsmegi, hóast koronatiltøkini sendu nógv starvsfólk, serliga í ferða- og matstovuvinnunum, men eisini í pørtum av handilsvinnuni, í lønarískoytisskipanina hjá ALS.

Fleiri fólk eru farin úr aftur skipanini og aftur í starvið tey høvdu frammanundan, men tað eru eisini fleiri, ið eru farin úr lønarískoytisskipanini yvir í onnur størv, tí eftirspurningurin eftir arbeiðsmegi hevur framvegis verið stórur aðrastaðni í føroysku vinnuni undir koronakreppuni.

Virkna føroyska arbeiðsfjøldin tekur harumframt ein part av einari møguligar afturgongd í virkseminum, áðrenn hetta sæst aftur í hagtølunum fyri arbeiðsloysið. Tann parturin av arbeiðsfjøldini, ið er omanfyri vanligan pensjónsaldur, er ikki skrásettur í arbeiðsstyrkini, og hesi verða tí ikki skrásett sum arbeiðsleys, um tey missa arbeiðið.

Føroyski búskapurin kundi sostatt fara munandi niður í ferð í kjalarvørrinum av koronakreppuni, áðrenn tað sæst serliga væl aftur á føroyska arbeiðsmarknaðinum.

[7] Sambært arbeiðsfjøldarteljing hjá Hagstovu Føroya frá februar í ár, var føroyska arbeiðsfjøldin tann virknasta í Evropa. Í Føroyum vóru 85,4% av borgarunum millum 15 og 74 ár virknir á arbeiðsmarknaðinum.

# STÓR ÓVISSA MYNDAR FRAMTÍÐARÚTLITINI

**Føroyar eru komnar rímiliga væl ígjøgnum koronakreppuna higartil, men framtíðarútlitini eru óviss. Tað er ikki bert korona, ið skapar óvissu, men eisini manglandi fiskivinnu- og handilssáttmálar við onnur lond umframt langtíðarætlanir á íløguøkinum**

Føroyska samfelagið var væl fyri at taka ímóti avleiðingunum av koronafarstóttini tíðliga í hesum árinum. Vinnan var sum heild val polstrað eftir fleiri ár við góðum úrslitum, men partar av vinnuni høvdu sæð eina heilt aðra framtíð fyri sær, áðrenn koronafarsóttin púra óvæntað broytti allar fortreytirnar.

Stórur vøkstur hevur verið í føroysku ferðavinnuni og vinnan hevði sæð ein enn størri vøkstur fyri sær komandi árini. Føroyska ferðavinnan hevur tí lagt nógv fyri og gjørt stórar íløgur, sum ikki vóru lidnar, tá ið koronatiltøkini læstu alla ferðavinnuna niður.

Almennu hjálparpakkarnir eru komnir væl við hjá serliga ferðavinnuni, og øðrum vinnum, ið eru knýttar at ferðavinnuni, men hjálparpakkarnir eiga bert at halda lív í vinnuni, so leingi vinnan er í undantaksstøðu av koronakreppuni.

Eftirspurningurin eftir føroyskum útflutningsvørum minkaði nógv, tá fleiri marknaðir stongdu, beint eftir at koronafarsóttin breyt út. Útlendsku marknaðirnir eru so smátt latnir upp aftur, men marknaðirnir eru framvegis nógv ávirkaðir av koronastøðuni, og hvussu leingi hetta fer at varða, og hvussu koronafarstóttin fer at hátta sær í nærmastu framtíð, er sera óvist í løtuni.

Omaná hesa óvissuna, kemur óvissan um fiskirættindi og marknaðaratgongd fyri føroyskar vørur uttanlands frameftir, umframt óvissan um, hvørjar íløguverkætlanir verða settar á skránna í føroyska samfelagnum komandi árini.

Fiskivinnuavtalan millum Føroyar og strandalondini gongur út um ársskiftið, og Føroyar hava heldur onga nýggja avtalu fingið við Stórabretland, nú Stórabretland fer úr ES á nýggjárinum. Langtíðaríløguætlanirnar hjá landinum vórðu fyribils tiknar av skránni í vár, og tær eru ikki settar á skránna aftur.

Óvissa er ein natúrligur partur av tilverugrundarlagnum hjá privatu vinnuni, men í løtuni er óvissan um framtíðarútlitini hjá føroysku vinnuni í størra lagi.

Søguliga hevur føroyskur fíggjarpolitikkur altíð verið viðrekandi og virkað stimbrandi á virksemið. Tá ið tíðirnar hava verið góðar, hava land og kommunur brúkt øktu skatta- og avgjaldsinntøkurnar til at økja enn meira um eftirspurningin og virksemið í samfelagnum, og umvent, tá ið tíðirnar hava verið minni góðar.

Seinastu árini hava tí ikki verið nakað undantak í so máta, og tað fer tí at krevja gott politiskt handalag og dugnasemi at stýra føroyska samfelagsbúskapin frameftir, soleiðis at land og kommunur ikki høgga bremsurnar í, nú niðurgongd og færri skatta- og avgjaldsinntøkur hómast fyri framman.

Politiska avbjóðingin verður at leggja skilagóðar framtíðarætlanir fyri, hvussu føroyska samfelagið skal mennast og útbyggjast fleiri ár fram í tíðina. Hetta er ein tann størsta fíggjarpolitiska avbjóðingin í løtuni.